# Funnið stórt korallriv við Føroyar




JAN MULLER

Havfrøðingar siga seg hava funnið eitt risastórt korallriv norðan, eystan og sunnan fyri Føroyar. Tað sigst vera fleiri túsund ára gamalt og eru gjørt úr „coral polyps", smá djór, sum hava lagað seg til lívið á sera stórum dýpi.

Hetta verður upplýst í fleiri av bretsku og skotsku bløðunum í gjár. Tað verður so tengt at leitingini eftir olju og royndunum hjá felagsskapinum Greenpeace at steðga hesi leiting.

Uppdagingin hevur fingið menn at seta stórt spurnartekin við ta oljuleiting, sum fer og skal fara fram á Atlantsmótinum.

Bretska blaðið The Guardian skrivar, at oljuleitingin norðan og vestan fyri Skotland er ein hóttan móti korallrivinum, sum hevur yvirlivað í einum øki, sum verður mett at vera eitt av teimum elstu og mest oyðnu á jørðini.

Hetta er komið fram á eini ráðstevnu, sum Greenpeace skipar fyri í London nú um dagarnar. Nakrir vísindamenn halda, at korallrivið, sum kann vera so gamalt sum seinasta ístíð, møguliga vil vísa seg at vera tann mest týdningarmikla vistfrøðiskipanin (økoskipan) í Norðuratlantshavi. Tað kann eiga lívið í meira enn 800 sløgum av fiski og ymsum havdýrum. Tað varð gjørt av kaltvatnskorallpolyppinum „Lophelia pertusa".

Blaðið skrivar, at økið, har hetta stóra korallrivið er, nú verður hótt av fleiri av heimsins størstu oljufeløgum, sum halda, at oljugoymslurnar her eru uppá einar 1,2 milliardir tons ella nógv størri enn tær í Norðursjónum.

BP skal sum fyrsta oljufelag nakrantíð fara undir oljuframleiðslu frá Foinaven keldunni í hesum árinum.

Sambært The Guardin fara havbiologar, sum eru við á ráðstevnuni hjá Greenpeace, at mæla stjórnini til at gevast við víðari oljuleiting, til ávirkanin á korallrivið og annað lív í havinum er kannað.

**Ólóglig leiting**

Greenpeace heldur, at loyvini, sum eru givin oljufeløgunum í apríl í ár, eru ólóglig og hevur longu mótmælt hesum hjá europeiska dómstólkinum. Ætlanin er nú eisini at fara til bretskar dómstólar fyri harvið at tvinga ráðharrar at taka stig til eina umhvørviskanning av økinum.

Annars hava bæði stjórnin og fleiri oljufeløg longu tikið stig til at kanna umhvørvið. Vísindamenn, sum standa Greenpeace nær, halda, at øll oljuleiting eigur at verða steðgað, meðan kanningarnar verða gjørdar.

Teir ávara um, at korallrivið kann verða skatt av sedimentum frá boringini og kann eisini verða ávirkað av kemiskum evnum frá boring. Alex Rogers frá „Marine Biological Association" sigur við blaðið, at uppdagingin av hesum stóra korallrivi kemur heilt óvart á.

**Stór kanning**

Í skotska blaðnum Press & Journal verður skrivað, at oljufeløgini og bretska stjórnin eru farin saman um at gera eina stóra kanning av havøkinum vestan fyri Hetland. Verkætlanin hevur fingið heitið „MIME".

Endamálið við hesi verkætlan er at minka mest møguligt um skaðiligu árinini á umhvørvið frá oljuvinnu á djúpum vatni.

Ein partur av kanningini er neyvt at fáa meira at vita um umrøddu korallriv. Teir, ið fíggja verkætlanina, hon kostar 20-25 mill. kr., eru The National Environment Research Council, The Engineering and Physical Sciences Research Council, DTI og eitt samtak við fleiri stórum oljufeløgum.

Verkætlanin er rættiliga umfevnandi. Hon fevnir m.a. um samspælið millum kemi og biologi á havbotninum og í havinum, ein kanning av at finna besta hátt at kunna taka sær av evnum, sum stava frá boring og sum kann skaða umhvørvið o.a.

Endamálið við kanningini sum heild at skilja betur eitt umhvørvið við so djúpum vatni og øllum tí, sum er knýtt at tí. Vitanin um slíkt økið er nógv minni enn vitanin vit í dag hava um eitt nú landsgrunnin. Sum so verður tað serstakliga Atlantsmótið, sum fer at verða kannað.

Ætlanin er at fara undir verkætlanina 1. juli og fer hon at taka trý ár. Leiðarin fyri Mime, Dr. Jonathan Williams sigur, at MIME fer at útvega okkum vitan, sum ídnaðurin hevur brúk fyri til tess at kunna bera seg rætt at í hesum so viðkvæma umhvørvinum.

Í greinini í skotska blaðnum verður eisini víst á, at kanningin kemur ikki inn á ta møguliga ávirkan, sum fiskiveiðan á djúpum vatni og sum er nógv økt av bæði sponskum og fronskum - og nú eisini bretskum - trolarum, kann hava fyri korallrivið.

Hesi skip toga sera tunga útgerð eftir sær, sum kann skaða eitt slíkt korallriv. Sambært blaðnum so er slík veiða higartil sloppin undan reguleringum.

Tað verður annars arbeitt við eini stórari umhvørvisætlan á føroyskum øki. Henda ætlan verður fyrireikað í løtuni og fara fleiri av oljufeløgunum, sum hava áhuga fyri føroyska økinum, at vera við.

Herfyri varð lýst eftir fólki í Føroyum at vera samskipari av kanningini. Tað er annars Halvor Snarvold frá AMG samtakinum, sum er leiðari av kanningini.

